Vágbingar stinga seg fram

Fyri fyrstu fer› í hesum árinum er eitt felag uttanfyri høvu›sta›in á odda í bestu deildini, og vágbingar tykjast ætla sær at vinna meiri í ár enn nakrantí› á›ur

NSÍ gjørdi rættuliga hol í sjógvin, tá teir sunnudagin smurdu HB av í Gundadali. Ta› hevur meiri enn so komi› fyri á›ur, og ta› var kanska ikki heilt óvænta›. NSÍ hevur vunni› tríggjar fer›ir upp í slag, og ta› plagar ikki at koma so ofta fyri. Fyrr í summar var› tosa› um ringt lag, skeivan venjara og meiri av tí slagnum, sum kemur fram, tá ta› gongdin ikki er gó›. Nú ver›ur tosa› um endastø›u í ovaru hálvu, og møguleikin fyri at røkka fjór›a plássinum og harvi› fyri fyrstu fer› at sleppa upp í part í Intertoto Cup er ikki so ógvuliga langt burtur.

HB hevur veri› oddali› sí›ani undan summarste›ginum. Fleiri fer›ir hevur veri› at hoyrt, at teir hava veri› hepnir at vinna, sjálvt um spæli› ikki altí› hevur veri› ta› besta. Solei›is gongst ta› ofta hjá einum oddali›i, men hesa fer› bar ta› ikki til.

Næsta taki› hjá NSÍ ver›ur heilt spennandi. Komandi sunnudag kemur VB nor›ur til Runavíkar. Úrslitini seinastu vikurnar siga okkum, at tá ver›ur talan um styrkisroynd millum tey bæ›i li›ini, sum í teimum seinastu umførunum hava sta›i› seg best.

Ein hálvskaddur Allan Mørkøre fekk ikki hjálpt HB til sigurs í uppger›ini móti NSÍ. Tapi› merkti eisini, at HB fyri fyrst noy›ist at siga farvæl til oddasessin

Mynd: Álvur Haraldsen

Vágbingar í hopla

Fótbóltslagi› og práti› í Vági er, sum ta› neyvan nakrantí› á›ur hevur veri›. Ta› sást eisini á áskoarafjøldini, sum í gó›ve›rinum sunnudagin var størri, enn hon plagar at vera, tá klaksvíkingar hava vitja› á Ei›inum.

VB vann torføra heimadystin ímóti KÍ. Ta› sær út til, at vágbingar hava fingi› ta› snitti›, sum oddali› plaga at hava. Teir vinna eisini, tá teir ikki eru heilt væl fyri vi› fólki, og tá dystirnir rí›a um snari›. Venjingarlegan í Danmark tykist koma væl vi›, og so er spurningurin, um VB seinasta tri›ingin av kappingini fer at megna at fáa so miki› stóra úrtøku, at fyrsti meistaraskapurin nakrantí› ver›ur vunnin. Hann er í hvussu so er nærri nú, enn hann nakrantí› hevur veri›. VB hevur onkuntí› sta›i› seg væl tey fyrstu umførini, men teir hava ongantí› á›ur veri› á fremsta plássinum, tá tveir tri›ingar av kappingini eru lagdir afturum. Í 1974 komu teir á fremsta pláss, tá teir tí›liga á árinum vunnu 2–0 á HB í Vági, men teir mistu plássi›, tá teir taptu í Fuglafir›i, og sí›ani tá hava teir ongantí› veri› fremstir.

Merkisvert er ta›, at VB hevur veri› sera stø›ugt í ár. Teir heilkiksa›u móti B71 í Vági, men sí›ani hava teir fingi› stig hvørja fer›. Teir hava spælt javnt í Klaksvík, í Sørvági og í Gundadali, har HB javna›i í sí›stu løtu. Allar hinar dystirnar hava teir vunni›.

Hvussu ta› fer at laga seg hjá VB er ikki minst tengt at úrslitunum næstu fer›irnar.

Eftir vitjanina í Runavík, fáa teir vitjan av HB. Í tri›ji sí›sta umfarinum skulu teir til Gøtu, og í næstsí›sta umfarinum, tá HB og B36 spæla í Gundadali, fer VB at taka ímóti toftamonnum á Vágsei›i. Ta› er als ikki óhugsandi, at meistaraskapurin fer at ver›a avgjørdur henda dagin. Men undir øllum umstø›um fær meistarin ikki steyp og krónur fyrrenn seinasta leikdagin. Tá skal VB spæla í Gundadali ímóti B36!

Tríggir eru um bo›i›

Umframt vágbingar og HB eru ta› bara toftamenn, sum mugu metast at hava møguleika at vinna FM. Teirra møguleiki er tengdur at, hvussu ta› fer at roynast hjá HB og VB. B68 avriki› ímóti Sumba var ikki serliga sannførandi. Fleiri fer›ir hevur B68 veri› kroyst sí›stu løtuna, og ta› hevur veri› ró› framundir, at teir hava havt ov lítla orku. Solei›is var ta› ikki móti Sumba.

Allir dystir eru t‡dningarmiklir, men stigini í summum dystum telja meiri, enn tey gera a›rar fer›ir. B68 hevur fleiri torførar uppgávur fyri framman. Eftir fer›ina til Sanoyar og KÍ vitjanina skulu teir til Runavíkar, og so skulu teir takast vi› oddali›ini. Fyrst HB á Svangaskar›i og so VB í Vági.

Aldudalurin

B36 var so at siga hara nógvu tey fyrstu umførini. Teir runnu undan øllum hinum li›unum. Eftir f‡ra ósigrar á ra› eydna›ist teimum at vinna í Sørvági og harvi› at vaska eitt sindur av lúsingini í Gladsaxe burtur. Men B36 ver›ur ikki longur rokna› millum FM bi›larnar.

Ta› ver›ur KÍ heldur ikki. Ta› hevur gingi› skjótt skeiva vegin tey sí›stu umførini. KÍ hevur tapt tríggjar fer›ir upp í slag. Ta› kemur ikki so ofta fyri. Undan summarste›ginum vendi gongdin, tá teir vunnu í Gundadali móti B36. B36 skal til Klaksvíkar, men á›renn ta› fær KÍ vitjan av GÍ, og so skulu teir á Svangaskar›.

Umframt B36 og KÍ eru Sumba og FSVágar í aldudalinum. Anna› av hesum li›unum ver›ur beinlei›is ni›urflytari. Annan sunnudag hittast li›ini í Sørvági, og tá ver›ur tann spurningurin nærri einum svari.

Sandoyingar kunnu framvegis flyta ni›ur. Sjálvt um B71 tapti, so gav avriki› í Gøtu ábendingar um, at teir ivaleyst vera drúgvir í tí strí›num.

jh

Eitt GÍ li›, sum var naka› væl yngri, enn teir plaga at vera, toga›i aftur tr‡ stig til húsa, og líkt er nú til, at GÍ er um at fara í holt vi› vanliga endaspurtin

Mynd: J. Jacobsen

GÍ togar seg fram

Hóast mi›alaldurin var nógv lække›ur, megna›i GÍ at vinna á sandoyingum

Mynd: J. Jacobsen

1. deild:
Eftir eina út av lagi vánaliga byrjan upp á ári›, er GÍ nú um at fáa rættuliga fer› á. Sunnudagin vór›u sandoyingar sendir heim vi› ongum

JÁKUP MØRK

GÍ-B71 5-3 (1-1)

Ta› vóru tvey li›, har umfatandi broytingar vóru framdar, sum fóru á vøllin í Sarpisger›i sunnudagin.

Hjá gestunum stó› kanska ringast til. Vanliga tryggi aftasti skansin, Waldemar Nowicki, er framvegis ikki komin fyri seg eftir ska›an, sum hann fekk móti VB fyri viku sí›ani, og tí mátti Hendrik Juul verja máli›.

Í sama dysti fingu bæ›i Eli Hentze og Jógvan Jón Petersen gult kort frá dómaranum, solei›is at teir heldur ikki kundu teljast vi› hjá venjaranum, og endiliga gjørdist Jón Brekku eisini sjúkur beint undan dystinum. F‡ra menn, sum vanliga teljast millum teir fyrstu ellivu vóru sostatt ikki tøkir, at talan var› um broytingar, er einki at siga til.

Ungt GÍ li›

Eisini teir á heimali›num høvdu sa›la eitt sindur um í mun til undanfarnu dystirnar. Royndir leikarar, so sum Jóan Pauli Olsen og Pauli Jarnskor, fingu høvi at hvíla seg, solei›is at a›rar og yngru kreftir sluppu at royna seg.

Mi›alaldurin á GÍ mundi tí vera naka› væl lægri enn hann vanliga er, og av teimum meira royndu gøtumonnunum, vóru ta› bert Magni og Henning Jarnskor, sum vóru á vøllinum.

Onkrir av ungu gøtumonnunum hava tó eisini veri› upp á tal til landsli›i› av og á, og ein av hesum, Poul Ennigar›, setti eisini hol á tí›liga í dystinum. Hetta hendi eftir hornaspark, har Poul at kalla rann seg inn í bóltin.

Stø›an helt sær til hálvleikurin var um at vera li›ugt spældur. Tá javna›i Bjørn Thorsteinsson fyri B71, eftir horna og eitt sindur av aftur og fram.

Aftur og fram

Helst høvdu sandoyingar ætla at verja eina stigi›, tá teir fóru á vøllin til seinna hálvleik. At byrja vi› gekst ein væl í so máta, og ta› var um reppi›, at Jákup Lamhauge fekk lagt teir á odda, tá hann gjørdist leysur í málteiginum.

Hann heilkiksa›i tó møguleikan, og løtu seinni lá bólturin ísta›in í sandoyarmálinum, eftir Hans Pauli Petersen var fyrstur á frísparksinnleggi.

Um hálvan hálvleikin økti GÍ lei›sluna upp í tvey mál, tá Óli Hansen var› spældur leysur eftir eitt skjótt tiki› fríspark. Sandoyingar bí›a›u eftir, at bólturin skuldi rullast naka› aftur, á›renn frísparki› var› tiki›, men dómarin tagdi, tá Óli var› sendir avsta›.

Hetta tók líka sum móti› frá sandoyingum, og tá Óli naka› seinni økti upp í 4-1, eftir at verjuspælari hev›i dráa› vi› bóltinum, tóktist eingin ivi at vera um, hvør skuldi ogna sær stigini.

Sandoyingar megna›u tó at skapa naka› av spenningi í aftur dystin, tá teir innan fyri fimm minuttir sendu tveir bóltar í gøtumáli›.

Fyrst var› Julian Florescu spældir leysur, so hann kundi smekka bóltin fram vi› málverjanum, og sí›ani skeyt Símun Hansen eitt vakurt mál, tá hann langa›i bóltin flatt í handara málhorn, eftir at Michael Jørgensen slapp fram vi› Bartal Eliasen, á›renn hann leg›i út frá.

Í eini seinastu roynd at javna, tveittu sandoyingar nú alt fólki› fram, og so kundi gøtumenn gera sær dælt av væntandi nærlagni í verjupartinum, solei›is at Súni Olsen vi› handaru stong kundi stúta bóltin í kassan.

GÍ er á veg

Ósigurin merkti fyri sandoyingar, at teir framhaldandi eru í júst somu stø›u á stigatalvuni, tó at teir saman vi› vágamonnum og sumbingum nú eru enn meira isolera›ir í dystinum um at sleppa undan ni›urflyting.

Fyri gøtumenn vi›førdi sigurin tó, at teir umsí›ur aftur kunnu hóma hei›ursmerkini, sum teir annars hava veri› langt burtur frá higartil í kappingarárinum. Vanliga hevur ta› veri› solei›is, at GÍ hevur havt eina sera gó›a seinnu hálvu, og megna teir rættuliga at seta fer› á nú, eru hei›ursmerkini kanska ikki heilt so veruleikafjar.

Í fyrstu atløgu krevur hetta tó ein sigur, tá komandi vikuskifti skulu á vitjan í Klaksvík. Hetta líkist einum dysti, her anna› li›i› ver›ur sett út á sí›uspor, og kenna vit gøtumenn rætt, fara teir at gera alt, til tess at tryggja, at ta› ikki vera teir, sum ver›a vi› svi›i› so›, tá hesin dystur er leiktur á tamb.

GÍ-B71 5-3 (1-1)

1-0: Poul Ennigar› 2
1-1: Bjørn Thorsteinsson 40
2-1: Hans Pauli Petersen 53
3-1: Óli Hansen 66
4-1: Óli Hansen 72
4-2: Julian Florescu 76
4-3: Símun Hansen 80
5-3: Súni Olsen 90

GÍ:
Sunnvard Joensen – Poul Ennigar›, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Poul Henning Jacobsen, Helgi L. Petersen, Magni Jarnskor, Súni Olsen, Henning Jarnskor – Hans Pauli Petersen, Óli Hansen

B71:
Hendrik Juul – Bjørn Thorsteinsson, Bernhard Petersen, Bergleif Sólsker – Høgni Hansen, Julian Florescu, Hans Jørgen Djurhuus, Kári Nielsen, Michael Jørgensen, Kristian Nielsen – Alex Nielsen

ÍF kom sterkt aftur

2. deild:
Í einum sera málríkum dysti í Fuglafir›i gjørdi ÍF eitt flott »comeback« og fór avsta› vi› øllum trimum stigunum móti KÍ

HEINI Í SKORINI

Eftir at EB/Streymur vann á TB og harvi› kom upp á 23 stig, var ta› av alstórum t‡dningi, at ÍF fekk øll tr‡ stigini í dystinum móti KÍ í Fuglafir›i leygardagin. Fyri dystin hev›i ÍF 17 stig, me›an tr‡ stig vóru upp til TB og EB/Streym, sum eisini møttust á Ei›i.

ÍF var favorittur at vinna dystin, av tí at KÍ á›renn dystin lá á níggjunda plássi, men ta› vísti seg at gerast ein sera javnur og spennandi dystur.

Eftir at dysturin var brígsla›ur í gongd, vóru ta› klaksvíkingar, sum fingu fyrsta máli›, og var ta› Torleif Ey›un Petersen sum skora›i. Men fyri hálvleik eydna›ist ta› fuglfir›ingum at javna, og var ta› tann altí› vandamikli Bár›ur á Lakjuni, sum fekk ta› máli›. Sostatt var hálvleiksstø›an 1-1 millum ÍF og KÍ.

KÍ leg›i sera væl út í seinna hálvleiki, og seinni hálvleikur var ikki meir enn farin í gongd, tá KÍ hev›i lagt seg á odda, og var ta› innskifti Erling Fles, sum skeyt ta› máli›. Stutt seinni hildu tey flestu, at nú var avgjørt, tí KÍ fekk nevniliga eitt mál afturat, og hesafer› var ta› Karl Marius Poulsen, sum skora›i.

Men sí›ani framdi ÍF venjarin nakrar útskiftingar, og hetta var orsøkin til bráðligu vendina í dystinum. Á›renn langt um leingi hev›i Rúni Petersen minka til 3-2, og tá ÍF helt á at tr‡sta á KÍ máli›, gekk ikki long tí›, á›renn stø›an gjørdist 3-3. Aftur var ta› Rúni Petersen, sum stó aftanfyri máli›. Ta› lá líkasum í luftini, at ÍF fór at fáa fleiri mál, og ta› fingu teir eisini. Bár›ur á Lakjuni skora›i til 4-3, og frøin var stór í Fuglafir›i, tá Rúni Petersen setti punktum vi› at skora til 5-3 til ÍF.

ÍF kom sostatt sera sterkt aftur, og megna›u teir í sí›sta enda at vinna 5-3, hóast teir vóru aftanfyri 3-1.

Tr‡ sera t‡dningarmikil stig til ÍF, sum eftir øllum at døma kemur at vera har›asti kappingarneyti hjá TB og EB/Streymi um uppflytingarplássi› til 1. deild. ÍF hevur í løtuni 20 stig saman vi› TB, me›an EB/Streym hevur 23 stig.

KÍ liggur harafurímóti á aftasta plássi, eftir at Royn vann á HB, og hóast teir hava gott fólk nor›i í Klaksvík, tykist ta› sum hava teir sera ringt vi› at fóta sær. Teir hava havt sera óstø›ug úrslit, tí hóast teir liggja á aftasta plássi, hava teir vunni› á bæ›i oddali›num EB/Streymi, og á B36, sum liggur á fjór›a plássi.

Næsta vikuskifti› tekur KÍ móti NSÍ í Klaksvík, me›an ÍF skal til Gøtu at vitja.



Fuglfir›ingar vilja ikki á nakran hátt sleppa takinum, sum teir hava fingi› í oddinum av stigatalvuni

Savnsmynd